# Handlar og góð tilboð

**Handilslívið í Runavíkar kommunu fer eisini at seta sín dám á mentanarvikuna, og eitt av kvøldunum verður ”open by night”**

**Alla vikuna, meðan mentanarvika er, verða góð tilboð at fáa í handlunum hjá Handilsmiðdeplinum.**

**Fríggjakvøldið 24. oktober, sum er uppundir endan av mentanarvikuni, hava handlarnir “open by night”, og tá verður opið til klokkan 22.**

**Tá verður eisini ”eksklusiv” mótaframsýning í Orkis á Glyvrum, har Dreymar sýna fram tað nýggjasta innan móta- og veitsluklæði í blómandi umhvørvi.**

**Kvøldið fyri verður eisini skipað fyri spennandi mótakvøldi í Sjókaféini í Runavík. Mótakvøldið er ókeypis, og øll eru vælkomin inn á gólvið.**

**Leygardagin 25. oktober hava handlarnir í Handilsmiðdeplinum langan leygardag, og tá verður opið til klokkan 17.**

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



# Nógvur tónleikur á skránni

**Ongum nýtist at keða seg á mentanarvikuni, sum hevur áhuga fyri tónleiki, tí tá verður av sonnum tónleikur, bæði á café og í Ítróttarhøllini í Runavík – so tað forslær**



*Eitt av kvøldunum á mentanarvikuni verður vísukvøld í Glyvra skúla við Hanusi G. Johansen, Martini Joensen, Annu Nygaard og Bjartmar Guðlaugsson av Egilstøðum í Íslandi*

Hjá teimum, sum hava áhuga fyri tónleiki, verður nógv ymiskt á skránni á mentanarvikuni.

Týskvøldið 21. oktober skipar Mentanarhúsfelagið í Runavíkar kommunu fyri Vísukvøldi í Glyvra skúla við Hanusi G. Johansen, Martini Joensen, Annu Nygaard og Bjartmar Guðlaugsson av Egilstøðum í Íslandi.

Eisini fara 11 ára gamla balletdansarinnan, Mille Scheufens og ungi klaverleikarin, Simon Søgaard Kristensen, bæði úr vinarbýnum Hjørring í Danmark, at sýna fram og spæla.

Café 67 skipar hóskvøldið 23. oktober fyri livandi tónleiki við Bjartmar Guðlaugsson, og fríggjakvøldið 24. oktober spælir Jens Marni.

Á Café Bedura spælir Bjartmar fríggjakvøldið, og tey hava eisini livandi tónleik leygarkvøldið.

Fríggjakvøldið 24. oktober verða eisini stór gospeltiltøk á skránni í Ítróttarhøllini í Runavík. Byrjað verður klokkan 19.30 við countrykonsert við Magna Christiansen og Theodori Petersen, og klokkan 22 verður rockkonsert við bólkunum T.O.S., The last breath og Credo.

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*





**Tín fyritøka** kemur í miðdepilin, tá tú velur Eik

www.eik.fo